## UTTAN ÚR HEIMI

# Fríggjadagin verður Nguyn tikin av døgum

**Tá sólin rísur í Singapore fríggjamorgunin, verður avstraliumaðurin Nguyen Tuong Van avrættaður, tí hann hevði 400 gram av rúsevni uppi á sær**

DEYÐADÓMUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein dagin fyri trimum árum síðani varð tann tá 22 ára gamli avstraliumaðurin Nguyen Tuong Van tikin í Singapore. Løgreglan avdúkaði, at hann hevði 400 gram av rúsevninum heroin uppi á sær, og í rættinum var eingin bøn. Nguyen bleiv dømdur til deyða.

Mitt í hesari vikuni fer bøðilin inn í klivan hjá Nguyen at vita, hvussu nógv hann vigar, og hvussu stórur hann er, tí tað má bøðilin vita, áðrenn hann tekur støðu til, hvussu sterkt og hvussu langt togið í gálganum skal vera. Tá sólin so rísur í Singapore fríggjamorgunin, verður fangi nummar 856 leiddur úr klivanum og yvir til gálgan. Løtu seinni verður tann 25 ára gamli avstraliumaðurin tikin av døgum. Tey seinastu orðini, sum hann hoyrir bøðilin siga, eru "Eg skal hjálpa tær til eitt betri stað enn hetta. Guð vælsigni teg."

Í síðstu viku vóru skyldfólkini hjá Nguyen í Singapore og søgdu honum farvæl. Tey sluppu kortini ikki at taka í hondina á honum, sum myndugleikarnir høvdu sett ein glasvegg ímillum teirra.



*Í lýsingini fríggjadagin verður Nguyen Tuong Van avrættaður*
*Mynd: Reuters*

Í Avstralia hava fólk kravt, at landsins myndugleikar skulu krevja deyðadómin hjá Nguyen broyttan. Tað sama hevur avstralska kirkjan gjørt, og Amnesty International hevur eisini biðið myndugleikarnar í Singapore ógilda deyðadómin. Avstralska stjórnin hevur tikið málið upp fleiri ferðir tey seinastu árini, og tað skuldi hon aftur gera á einum fundi í bretska ríkisfelagsskapinum í gjár.

Avstralska blaðið Sidney Morning Herald fýlist á, at John Howard, forsætisráðharri, ætlar sær at hyggja at einum cricketdysti júst um tað mundið, tá Nguyen verður avrættaður fríggjamorgunin. Men forsætisráðharrin vísir atfinningunum aftur.

- Arbeiði mítt umfatar so mong øki. Tað er ikki eg, sum havi gjørt av, at hann skal avrættast fríggjamorgunin, og eg haldi ikki, at tað avstralska fólkið fær ilt av, at eg fari at hyggja at cricket-dystinum, segði John Howard sunnudagin.

# Umfatandi barnasmugling avdúkað

**Myndugleikarnir í Danmark, Noregi og Svøríki hava avdúkað eitt kinesiskt smuglakakervi, sum hevur smuglað nógv børn úr Kina til Norðurlond**

BARNASMUGLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Herfyri avdúkaði danska løgreglan eini kinesisk hjún, sum høvdu tikið trý kinesisk børn úr einari flóttafólkalegu á Sælandi, og avdúkingar í Noregi og Svøríki vísa nú, at talan er um eitt væl skipað kervi, sum hevur smuglað umleið 150 børn úr Kina til Norðurlond.

Í Danmark siga myndugleikarnir, at har eru umleið 30 kinesisk børn og ungfólk horvin, í Noregi sóknast løgreglan eftir fleiri kinesiskum børnum, og svenska løgreglan sigur, at har eru umleið 90 kinesisk børn og ungfólk horvin.

Løgreglan í Stockholm hevur tikið tveir kinesarar, ein mann og eina kvinnu, og tey eru nú varðhaldsfongslað og skuldsett fyri grova mannasmugling. Í íbúðini hjá teimum fann løgreglan væl av pengum, og tí verður nú kannað, um talan kanska eisini er um mannahandil, skrivar tíðindastovan TT. Ein annar møguleiki er, at børnini verða rænd, og at smuglararnir selja summi av gøgnum teirra.

Kanningarnar higartil hava víst, at tey flestu smuglaðu børnini og ungfólkini eru úr landspørtunum Fujian og Zhejiang har eysturi í Kina.

## Dýrt skemt

Ein 20 ára gamal svii hugsaði seg ikki nóg væl um, tá hann leygardagin fór til eitt av starvsfólkunum í einum ferðamannaflogfari og segði, at ein vinmaður hansara hevði eina bumbu hjá sær í flogfarinum.

Flogfarið var á veg úr Stockholm til Spania, og flogskiparin boðaði alt fyri eitt myndugleikunum á flogvøllinum frá tí, sum tann svenski ferðamaðurin hevði sagt. Tí vóru trygdarmenn, løgreglumenn og sløkkiliðsmenn á flogvøllinum, tá flogfarið kom, og so skjótt tað hevði sett seg, lupu trygdarmenn og løgreglumenn inn í flogfarið, har teir handtóku svian og vinmann hansara.

Tað vísti seg, at eingin bumba var í flogfarinum, men sponsku myndugleikarnir siga, at málið verður kortini viðgjørt eum eitt yvirgangsmál. Tann 20 ára gamli sviin er fyribils varðhaldsfongslaður. Verður hann skuldsettur sambært sponsku yvirgangslógini, kann hann fáa upp í 25 ára fongsul, skrivar Aftonbladet.

## Veturin kom....

Nógvastaðni í Evropa fingu tey tann fyrsta kavan um vikuskiftið, og kuldin hevur eisini kravt tey fyrstu mannalívini.

Í franska býnum Calais funnu løgreglumenn líkið av einum 58 ára gomlum manni. Hann var heimleysur og hevði lagt seg at sova í einum bilskúri, nú tað var vorðið so kalt. Í Bruxelles í Belgia var eisini kalt, og har bleiv ein maður funnin deyður í kulda uttan fyri eina kirkju.

Í Týsklandi var kavarok nógvastaðni, og eitt skifti høvdu 250.000 fólk í landspartinum Nordhrein-Westfalen ongan streym, so myndugleikarnir noyddust at senda boð eftir ljósmotorum til sjúkrahús, ellisheim og eldraíbúðir. Kavin órógvaði eisini ferðsluna nógv í Týsklandi, Fraklandi, Belgia og Bretlandi. So langt suðuri sum í franska landspartinum Provence órógvaði kavin ferðsluna.

## Harðari kós

Nógv bendir á, at nývaldi forsetin í Sri Lanka, Mahinda Rajapakse, fer at reka eina meiri harðrenda kós ímóti teimum tamilsku loysingarmonnunum, sum krevja, at tann norðari parturin av landinum skal fáa sjálvsstýri.

Í einari røðu leygardagin segði forsetin, at hann fer ikki at góðtaka, at børn verða brúkt sum hermenn, og at stjórn hansara fer ikki at samráðast við nakran, sum ikki virðir altjóða mannarættindini. Eygleiðarar siga, at hetta var ein beinleiðis ávaring til tamilarnar, sum verða lagdir undir at brúka børn sum hermenn.

Tann nývaldi forsetin hevur sagt, at hann er til reiðar at tosa við tamilarnar, men at talan verður ikki um tamilskt sjálvstýri. Í røðuni leygardagin segði hann, at stríðið við tamilarnar kann loysast, men at tað skal loysast innan fyri ríkiseindina, sum hann tók til.

Teir tamilsku veljararnir tóku ikki lut í forsetavalinum. Leiðslan teirra hevði rátt teimum frá at fara á val, og bara nakrir fáir settu seg upp ímóti áheitanini, skrivar AP úr Colombo.

## Hvussu gamal er Mánin?

Vísindafólk eru á einum máli um, at okkara sólskipan er umleið 4,6 milliardir ára gomul, men vísindafólk hava leingi verið í iva um, hvussu gamal okkara Máni er.

Vísindafólk halda, at Mánin er úrslitið av einum samanstoyti ímillum Jørðina og ein stóran rúmdarstein, men tey hava verið í iva um, nær tað hendi. Nú hava sveisiskir, týskir og bretskir granskarar kannað tilfar, sum amerikanarar hava tikið á Mánanum, og teir halda seg hava funnið svarið.

Í einari grein skriva granskararnir, at samanstoyturin ímillum Jørðina og tann stóra rúmdarsteinin var umleið 30 milliónir ár, eftir at okkara sólskipan var til. Teir hava eisini roknað seg fram til, at tað gingu umleið 20 milliónir ár, til Mánin fekk tað skap, sum hann hevur nú.

Lesið Sosialin - so eru tit við